LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 12. september 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/16456

# Samandráttur av skrivi til Løgmansskrivstovuna um treytirnar sambært landsstýrislønarlógini fyri eftirløn við 60 ára aldur

Í klaguni um Løgmansskrivstovuna, dagfest 25. juni 2024, varð gjørt galdandi, at Løgmansskrivstovan ikki tulkaði reglurnar um eftirløn við 60 ára aldur í landsstýrislønarlógini (løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna) á rættan hátt. Víst varð í hesum sambandi m.a. til skriv frá Løgmansskrivstovuni, har lagt varð til grund fyri útrokningini eftir § 3 stk. 2 í landsstýrislønarlógini, at ár í aldri og starvstíð, sum vóru aftaná 2015, ikki kundu teljast við í uppgerðina, og at viðkomandi landsstýrismaður tí ikki leyk treytirnar fyri pensjón við 60 ára aldur.

Løgmansskrivstovan vísti innleiðandi m.a. á § 3 stk. 2, sum í tíðarskeiðnum frá 18. mai 2006 til 15. september 2015, var soljóðandi:

> “*Stk. 2.* Er aldurin á landsstýrismanninum og tvær ferðir starvsaldurin á tingi og í landsstýrinum til samans í minsta lagi 95 ár, fær hann eftirløn frá 60 ára aldri eftir somu reglum, sum eru ásettar í stk. 1. Løgmaður kann veita løgmanni ella landsstýrismanni, sum er fráfarin og er fyltur 60 ár, egineftirløn eftir stk. 1, um heilsulig, fíggjarlig ella onnur sosial viðurskifti tala fyri tí.”

Harnæst varð víst á, at greinin varð sett úr gildi í 2015, men hevði framhaldandi gildi fyri teir landsstýrismenn, sum tá høvdu verið. Tað var kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015 um gildiskomu av løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. (endurskoðan av samsýning og eftirløn landsstýrismanna), sum setti nevndu § 3 úr gildi. § 2 í kunngerðini hevði hesa orðing:

> “§§ 3, 4, 4 a, 4 b og 5 og § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. fara úr gildi. Greinirnar hava tó framvegis gildi fyri landsstýrismenn og hjúnafelaga ella børn, sum sita, ella hava sitið áðrenn úrgildissetanardagin. Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag*.”*

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Hendan áseting var ætlað sum skiftisskipan í sambandi við skiftið frá tænstumannalíknandi skipanini við eginpensjón til nýggja 15% pensjónsskipan fyri landsstýrismenn og løgmenn, sum líkist teirri skipan, sum er vanlig hjá alment settum starvsfólkum, sum ikki eru tænastumenn.

Vísandi til ásetingina um at eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum ikki hækkar eftir nevnda dag, metti Løgmansskrivstovan, at ár í aldri og starvstíð, sum vóru aftaná 2015, ikki kundu teljast við í uppgerðina fyri, um viðkomandi landsstýrismaður leyk treytirnar fyri pensjón við 60 ára aldur.

<u>Umboðsmaðurin viðmerkti:</u>

§ 3 í landsstýrislønarlógini, sum hevði gildi frá 18. mai 2006 til 15. september 2015 var soljóðandi:

> "**§ 3.** Landsstýrismaður hevur rætt til egineftirløn, tá ið hann hevur verið landsstýrismaður í minsta lagi í eitt ár samanlagt. Eftirlønin verður útgoldin mánaðarliga frammanundan frá 1. í mánaðinum eftir tað, at hann hevur fylt 67 ár, og útgjald eftir § 1 er steðgað, sbr. tó stk. 2.
> *Stk. 2.* Er aldurin á landsstýrismanninum og tvær ferðir starvsaldurin á tingi og í landsstýrinum til samans í minsta lagi 95 ár, fær hann eftirløn frá 60 ára aldri eftir somu reglum, sum eru ásettar í stk. 1. Løgmaður kann veita løgmanni ella landsstýrismanni, sum er fráfarin og er fyltur 60 ár, egineftirløn eftir stk. 1, um heilsulig, fíggjarlig ella onnur sosial viðurskifti tala fyri tí.
> *Stk. 3.* Hægsta egineftirløn, sum er 60% av eftirlønargevandi_lønini í tí lønarflokki, landsstýrismaðurin er samsýntur eftir, verður veitt, tá ið eftirlønaraldurin er 8 ár ella meiri. Hvørt eftirlønaraldursár er uppíroknað útrokningarprosentið soleiðis, at 1.-4. ár telja 9% hvørt, og 5.-8. ár telja 6% hvørt. ..."

§ 13, stk. 2 varð sett í landsstýrislønarlógina við lóg nr. 71 frá 19. mai 2014 við hesi orðing:

> "*Stk. 2.* Landsstýrið ásetur í kunngerð, nær §§ 3, 4, 4 a, 4 b og 5 og § 8, stk. 2 fara úr gildi. Greinarnar hava tó framvegis gildi fyri landsstýrismenn, sum sita, ella hava sitið áðrenn úrgildissetanardagin og hjúnafelaga ella børn teirra. Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag."

§ 2 í kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015, sum ásetti úrgildissetudagin, um gildiskomu av løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. (endurskoðan av samsýning og eftirløn landsstýrismanna) o.a. hevði eina orðing, sum var ein endurtøka av orðingini í § 13 stk. 2 í landsstýrislønarlógini.

Í viðmerkingunum (løgtingsmáli 095/2013) til § 13 stk. 2 stendur m.a.:

> "Nr. 5. Illa fer at bera til at gera seg inn á vunnin rættindi hjá landsstýrismonnum, sum nú sita. Teir varðveita tí hesi rættindi, tó so, at starvsaldurin steðgar at telja, tá ið broytingin

> fær gildi. Broytingin fær gildi, tá ið nýtt landsstýrið tekur við eftir løgtingsval, og skrivast má tá út kunngerð við úrgildisdagfesting fyri, nær gamla pensjónsskipanin fer úr gildi. Landsstýrismenn, sum framhaldandi sita eftir komandi løgtingsval, fáa hereftir 15 % útgoldið afturat lønini til privata pensjónsskipan..."

Umboðsmaðurin segði, at tað var sín fatan, at við lógarbroytingini frá 2014 var ætlanin at fara frá gomlu tænastumannalíknandi eftirlønarskipanini í § 3, t.v.s. bæði vanligu eginpensjónini við 67 ár og 60 ára pensjónini, men at man samstundis vildi hava eina skiftisskipan fyri landsstýrismenn, sum sita ella hava sitið áðrenn úrgildissetanardagin, sum kunngerðin ásetti til at vera 15. september 2015. Spurningurin var so, hvørja skiftisskipan § 13, stk. 2 í landsstýrislønarlógini og § 2 í kunngerðini ásetti við tekstinum:

> "... Greinarnar hava tó framvegis gildi fyri landsstýrismenn, sum sita, ella hava sitið áðrenn úrgildissetanardagin og hjúnafelaga ella børn teirra. Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag "

Viðmerkingarnar til § 13, stk. 2 nýta orðingina: " ... Teir varðveita tí hesi rættindi, tó so, at starvsaldurin steðgar at telja, tá ið broytingin fær gildi", meðan lógarteksturin í § 13 stk. 2 í landsstýrislønarlógini og § 2 í kunngerðini nýta orðingina: "...Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag. ".

Tað eru sambært § 3 stk. 2 í landsstýrislønarlógini tvey viðurskifti, sum eru avgerandi fyri, um landsstýrismaður lýkur treytirnar fyri at fáa egineftirløn, tá hann gerst 60 ár, t.e. aldurin á landsstýrismanninum, tá hann síðst fór frá sum landsstýrismaður, og starvsaldurin í landsstýri og løgtingi (bæði umrødd í LUM 17/00062).

Um staðfest er, at landsstýrismaður hevur rætt til eginpensjón eftir § 3 stk. 1 ella stk. 2, er tað eftirlønaraldurin roknaður eftir § 3 stk. 3, sum er avgerandi fyri, hvussu høg eftirlønin skal verða. Hægsta egineftirløn verður veitt, tá ið eftirlønaraldurin er 8 ár ella meira.

Tá viðmerkingar og lógartekstur ikki nýta somu orðing um, hvørji rættindi steðga ella ikki hækka eftir úrgildissetanardagin fyri § 3, førir hetta til ein iva, um orðið "eftirlønaraldurin" sipar til viðurskiftini í § 3 stk. 2 (aldur og/ella starvsaldur), sum gera seg galdandi í útrokningargrundarlagnum fyri at vinna sær rætt til pensjón sum 60 ár, ella um sipað verður til eftirlønaraldurin, sum er nevndur í § 3 stk. 3 og sum er avgerðandi fyri støddina á eftirlønini.

Løgmansskrivstovan er í síni niðurstøðu komin til, at skiftisskipanin inniber at ár, sum leggjast afturat aftaná 15. september 2015 – tað verið seg aldur á landsstýrismanni og starvsaldur – ikki kunnu teljast við í uppgerðina eftir § 3, stk. 2. Løgmansskrivstovan metir sostatt, at tað eru sjálv rættindi til 60 ára pensjón, t.v.s. útrokningargrundarlagið eftir § 3 stk. 2, sum ikki kann hækka eftir 15. september 2015.

Um orðið eftirlønaraldurin hinvegin sipar til eftirlønaraldurin nevndur í § 3. stk. 3, so er tað ikki innvinningin til rættin til 60 ára pensjón, sum steðgar pr. 15. september 2015, men bert hækkingin í egineftirlønini, t.v.s. hvussu høga pensjón man hevur rætt til eftir 60 ára regluni. Sagt við øðrum orðum, so leggjast ár í aldri og starvstíð eftir 2015 framhaldandi afturat útrokningargrundarlagnum, meðan tað er støddin á pensjónini, sum verður fastlæst.

Lógarviðmerkingar og lógartekstur tykjast sostatt at peika hvør sín veg, og ilt er at fáa eyga á, um endamálið við umrøddu orðing sipar til § 3 stk. 2 ella stk. 3.

Umboðsmaðurin helt tað í hesum sambandi vera viðkomandi at gera vart við, at Føroya Løgting nýliga hevði samtykt (lóg í koming) lóg nr. 55 frá 29. mai 2024 um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk. Í § 9 stk. 2 er ein skiftisskipan ásett fyri løgtingsmenn, sum sita ella hava sitið á tingi úrgildissetanardagin. § 9 stk. 2, 2 pkt. hevur orðingina: "Eftirlønaraldurin hækkar tó ikki eftir nevnda dag". Hetta er sama orðing, sum umstrídda orðing í hesum máli. Lógarviðmerkingarnar til hesa nýggju áseting geva eina ábending um, at tá sagt verður, at eftirlønaraldurin ikki hækkar eftir ávíst dato, so verður sipað til eftirlønaraldurin, sum avgerð støddina av pensjónini og ikki rættin til 60 ára pensjón.

Vísandi til ivan, sum var í málinum, og at Løgmansskrivstovan, sambært málsskjølunum, ikki hevði viðgjørt spurningin um, hvørt orðið "eftirlønaraldurin" kundi víst til ásetingina í § 3 stk. 3 heldur enn til ásetingina í § 3 stk. 2, og at hetta kundi verið avgerandi fyri eftirlønarviðurskiftini hjá viðkomandi landsstýrismanni, heitti umboðsmaðurin á Løgmansskrivstovuna um at taka málið til nýggja viðgerð.

Umboðsmaðurin bað Løgmansskrivstovuna lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður